## Sunda bókasavn byrjar aftur

Tað fyrsta á skránni er »Heystið í urtagarðinum«. Tað er Michael Jacobæus, sum kemur at greiða frá, hvussu leykir skulu setast í jørðina, og hvussu ein skal bera seg at við at skera trø og runnar í urtagarðinum. Hetta verður hósdagin 27. september klokkan 19. Sunda bókasavn heldur til í Norðskála-Oyrar skúla á Oyrarbakka og er samstundis námsfrøðiligi tænastudepil skúlans. Bókasavnið er opið fyri almenninginum mikudag klokkan 14–16 og 19–20. Seinnapartin er tað serliga barnagarðurin, ið brúkar bókasavnið, og smábarnafamiljurnar eru raskar at vitja bókasavnið um kvøldarnar, skrivar bókasavnið í tíðindaskrivi.



# Hercules møguliga brúkas

**- Enn hava vit ikki tikið endaliga avgerð um, hvat vit fara at brúka Hercules til, men talan kann bæði vera um fiskivinnu ella aðra vinnu. Tað sigur sigur Elisabeth E. Olsen, sum eigur ein triðing í felagnum Framherja, ið nú eigur stóra verksmiðjutrolaran Hercules**



*- Hevði skipið bert havt møguleikar í fiskivinnuni, høvdu vit ivaleyst verið meira varin, men nú verða ymiskir møguleikar kannaðir, sigur Elisabeth E. Olsen*

HERCULES

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Seinasta mikudag keypti Framherji, sum frammanundan eigur Fagraberg, Vesturvón, Høgaberg og Stapan, stóra verksmiðjutrolaran Hercules, sum fyrr í ár brendi, meðan skipið var til fiskiskap í Kyrrahavinum.

116 mans vóru við skipinum hendan túrin, eldur kom í. Teir flestu bjargaðust, men 11 lótu lív.

Eldur kom í skipið beint eftir, at vaktarskiftið hevði verið umborð. Tí vóru menn ikki í koyggjuni, men antin á veg av vakt – ella á vakt.

Í samrøðu við Sosialin, segði kona føroyska skiparan, Jóna Rasmussen, at eftir fáum minuttum, stóð at kalla alt skipið í ljósum loða.

Tað var reiðaríið Thor í Hósvík, sum átti skipið. Hetta var tann fyrri verksmiðjutrolarin hjá felagnum, sum eldur kom í yvir lutfalsliga stutta tíð.

### Eingin avgerð

Í samrøðu við Sosialin seinasta hósdag váttaði Anfinn Olsen, reiðari, at Framherji dagin fyri hevði keypt skipið frá Tryggingarfelagnum Føroyar.

Í løtuni er Anfinn burturstaddur, men vit hava spurt konuna, Elisabeth E. Olsen, sum er triði parturin í Framherja, um felagið hevur gjørt av, hvat skipið skal brúkast til.

- Vit hava keypt Hercules, tí vit meta, at skipið hevur ymiskar møguleikar, bæði innan fiskivinnu og aðra vinnu.

Hon sigur, at enn er endalig avgerð ikki tikin, men arbeitt verður við ymiskum møguleikum.

Spurd, um felagið í hesi meting eisini hugsar um oljuvinnu, sigur hon, at hetta er ein møguleiki.

- Oljuvinnan flytir seg norðureftir og heilt norður í polarøkini, og ein fyrimunur við Hercules er, at skrokkurin er ísstyrktur. Tí kann skipið eisini brúkast til sigling á leiðum, har ísur er.

Sum skilst, verða líka stór skip sum Hercules brúkt til eitt nú seismikkvirksemi, og tí verða hesir møguleikar eisini tiknir við, tá Framherji fer at taka endaligu avgerðina um skipið.

Elisabeth E. Olsen leggur tó dent á, at enn er eingin avgerð tikin.

- Eg trúgvi, at í løtuni er møguleikin fifty fifty, um skipið fer aftur í fiskivinnu – ella, um talan kanska verður um virksemi í aðrari vinnu, eitt nú oljuvinnu, sigur hon.

### Nógv jarn

Tað hevur ljóðað, at Framherji keypti Hercules fyri 36 miljónir krónur, men hetta vildi Anfinn Olsen, reiðari, ikki vátta, tá vit tosaðu við hann seinasta hósdag.

Elisabeth E. Olsen vísir á, at hetta er eitt stórt skip, og bara jarnið í skipinum er eitt virðið í sjálvum sær.

- Men tað er ikki ætlanin hjá Framherja at selja skipið sum gamalt jarn. Um so var, høvdu vit ikki keypt.

Hon vísir á, at Samherji, sum er samstarvsparturin hjá Framherja, hevur virksemi í ymiskum londum og tískil eisini hevur rúman kunnleika um møguleikar uttanfyri íslendsku og før-




# Fransmonnum líkar innflutta rávøru



**Tey, sum meirvirka fiskavørur í Fraklandi, halda, at tað í nógvum førum er lættari at útvega sær ráfiskin á altjóða marknaðinum enn í Fraklandi**

FRAKLAND

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Franskir framleiðarar, sum virka fiskavørur til egnan marknað, kenna seg rættiliga bundnar av innfluttari rávøru. Hetta vísir ein kanning, sum Ofimer hevur gjørt.

- Tað er lættari fyri tey, sum fáast við meirvirking, at útvega sær rávøruna á altjóða marknaðinum, har rávøran er atkomilig alt árið - og fyri prísir, sum tú kanst rokna við.

Ráfiskaprísirnir á franska marknaðinum eru harafturímóti ógvuliga skiftandi - viðhvørt í toppi og aðrar tíðir í botni.

Tað sigur Philippe Paquotte, ein av stjórunum í Ofimer.

Laksur, rækjur, hvítfiskur sum alaska pollok og skeljafiskur eru mest eftirspurdu rávørurnar í Fraklandi, tí hesar eru lættast fyri tey, sum meirvirka, at fáa hendur á.

Franska meirvirkisvinnan stóð í 2006 fyri 3,5 miljardum evrum.